# Burðardygds-frágreiðing 2022

*Ger mun*



BANKNORDIK

# Innihald


3 **INNGANGUR**

Til okkara áhugabólkar
Okkara virksemi og burðardygd
Eitt sterkt fíggjarsamtak

7 **BURÐARDYGD**

Okkara kjarnuáhugabólkar
Burðardygdspolitikkur
Burðardygdsnevnd og -bólkur
Okkara mál
Ávirkan á búskapin

11 **ESG**

ESG og Nasdaq
ESG-lyklatøl
Burðardygt nærsamfeløg
Minka okkara umhvørvisfótaspor
Leiðsla næstan í kynsjavnvág

19 **OKKARA ÁHUGABÓLKAR**

Íleggjarar
Kundar
Starvsfólk
Nærsamfelag

# Inngangur



# Til okkara **áhugabólkar**



Góði lesari,

Sum ein fíggjarstovnur, ið hevur virkað og ávirkað privatlív og vinnulív síðani 1906, eru vit tilvitað um okkara leiklut og ábyrgd í samfelagnum. Tað er okkara skylda at stuðla undir einari jaligari menning í øllum pørtum av teimum samfeløgum, vit eru í.

*Environmental*, *Social* og *Governance* (ESG) hava vit týtt til *Umhvørvi*, *Fólk* og *Leiðsla*. ESG-lyklatølini hava ein avgerandi leiklut í okkara arbeiði. Fyrst av øllum eru lyklatølini við til at eyðmerkja okkara støðu, og tey hava eisini týdning fyri tey mál, vit seta okkum nú og í framtíðini. Vit hava valt nøkur ESG-lyklatøl við støði í okkara virksemi og týdning fyri okkara áhugabólkar.

Okkara starvsfólk eru okkara týdningarmiklasta tilfeingi, og vit stremba eftir at tryggja eitt sunt arbeiðspláss, har stavsfólkini hava møguleikar at mennast persónliga og fakliga. Eisini stremba vit eftir at hava eina fjølbrotta arbeiðsfjøld, ið virkar undir teimum bestu leiðsluskipanum, tí vit eru sannførd um, at hetta førir til eitt burðardygt virksemi við betri úrslitum.

Sum tú m.a. kanst lesa í hesi frágreiðing, hava vit eydnast væl við at fáa kynsjavnvág á leiðslustigi, meðan vit eisini hava avbjóðingar á økinum. Vit leggja stóran dent á at loysa avbjóðingar og samstundis at varðveita okkara avrik at skapa kynsjavnvág í BankNordik-samtakinum.

Úlát av vakstrarhúsgøssum (greenhous gasses ella GHG) hevur stóra ávirkan á alheims-upphitingina og óstøðug veðurviðurskifti, so er tað trupult at spáa um langtíðarárinini og at skilja avleiðingarnar til fulnar. Men sum ein sterkur fíggjarstovnur, er tað okkara skylda at taka ábyrgdarfullar avgerðir, ið taka hædd fyri langtíðarheilsuna hjá Jørðini. Okkara leiklutur í hesum er at menna og bjóða tænastur, ið gera tað møguligt hjá kundunum taka burðardyggar avgerðir at minka $CO_2$-útlátið og sostatt skapa møguleikar fyri eini burðardyggari framtíð.

At bjóða okkara kundum burðardyggari møguleikar hongur óloysiligt saman við okkara virkisstrategi og kjarnuvirksemi. Vit bjóða eina røð av burðardyggum og ábyrgdarfullum produktum, t.d. elbillán, grønt bústaðarlán og orkulán, ið stuðla undir eini jaligari gongd at minka um útlát. Harumframt gera vit íløgur í ábyrgdarfull virkir, ið hava jaliga ávirkan á ESG-viðurskifti.

Vit hava bundið okkum til at fáa okkara beinleiðis útlát (vav 1) niður á NULL í 2025 og at minka um okkara óbeinleiðis útlát (vav 2) somuleiðis niður á NULL í 2030. Fyri at málið fyri vav 2 skal røkkast, má SEV eisini røkka sínum málið fyri 2030, tí vav 2 fevnir m.a. um el-orku til okkara virksemi. Vit eru farin í holt við at rokna vav 3, sum t.d. er útlát hjá okkara starvsfeløgum og veitarum. Vit fara komandi árini at halda fram við hesum arbeiðinum. Avbjóðingin er góðskan av dátunum, ið vit tó fara at menna saman við okkara samstravspørtum.

Fyri at góðskutryggja burðardygds-arbeiðið, hava vit í 2022 ment ein burðardygds-politikk, sett eina nevnd og ein bólk, soleiðis at arbeiðið við burðardygd verður integrerað við gjøgnumskygni.

Okkara innanhýsis og uttanhýsis stake-holdarar eru týðandi í øllum tí, vit gera, og tískil eru teirra tørvir avgerandi fyri okkara virkis- og burðardygdsstrategi. við okkara kjarnustakeholdarum, ið eru okkara stravsfólk, kundar, nærsamfeløg og íleggjarum. Vit arbeiða sostatt áhaldandi við at fáa ein dialog um burðardygd við okkara stakeholdarar komandi tíðina.

Í hesi frágreiðing finnur tú upplýsingar um, hvat vit hava gjørt á burðardygga økinum, okkara ESG-avrik í 2022 og okkara mál fyri 2023 - og longur inn í framtíðina.

Vit ynskja tær góðan lesihug.

**Árni Ellefsen**
forstjóri

**Turið F. Arge**
varastjóri

# Okkara **virksemi** og **burðardygd**

BankNordik er ein fíggjarstovnur, ið bjóðar fíggjartænastur til vinnu- og privatkundar í Føroyum og Grønlandi. Okkara kjarnuøki eru ávikavist bankayrki, pensjón og tryggingar, og tað eru okkara starvsfólk, sum eru áleið 200 í tali, ið standa aftanfyri tað góða arbeiðið, ið verður gjørt á hesum kjarnuøkjum. Okkara kjarnuøki er innanfyri bankayrki, pensjón og tryggingar.

Samtakið arbeiðir áhaldandi við at varðveita marknaðarpartin í Føroyum og at vaksa í Grønlandi, har vit einans hava bankavirksemi. Í Føroyum hava vit Trygd við tryggingartænanstum, NordikLív við pensjónstænastum og Skyn við ognarmeklaravirksemi.

Vit vilja vera meira enn ein banki - vit hava knýtt sterk, varðandi og burðardygg bond saman við okkara kundum og nærsamfelagum. Hesi bond stremba vit eftir  at varðveita og styrkja við at vera ein álítandi samstravsfelagi. Vit arbeiða miðvíst við at hjálpa okkara kundum við at røkka teirra fíggjarligu og burðardyggu málum. Hetta gera vit við at menna og bjóða fíggjartænastur, ið byggja á servitan, nærlagni og drúgvar royndir hjá okkara starvsfókum.

Vit hava átikið okkum leiklutin at gera okkara kundar førar fyri at hava eina jaliga ávirkan á grønu umleggingina. Hetta er ikki bara ein samfelagsskylda - hetta gevur eisini strategiskt meining fyri okkara kjarnuvirksemi.

Okkara stremban eftir at verða meira enn ein banki hevur røtur í okkara viðum og samsvarar við øktu krøvini til gjøgnumskygni og ábyrgd, ið koma frá okkara áhugabólkum. Hetta er tætt knýtt at okkara virkisstrategi.

At taka ábyrgd er grundliggjandi í okkara virksemi, tí hetta loyvir okkum at brúka okkara evnir, servitan og royndir til at gera mun. Ábyrgdin skal endurspeglast í teimum fíggjarligu avgerðunum hjá okkara kjarnuáhugabólkum.

BankNordik er ein fíggjarstovnur við 100 ár á baki. Vit virðismeta okkara tættu sambond við okkara kundar og samstarvsfelagar, og vit leggja stórt virði í at reka eina sunna og sterka fyritøku til frama fyri bæði kundar, samstarvsfelagar og tí samfelagi, vit eru partur av.



Á næstu síðunum kanst tú lesa meira um, hvussu virksemið og burðardygd ganga hond í hond hjá okkum.



**Eitt sterkt fíggjarsamtak við virksemi í Føroyum og Grønlandi:**

- ✓ 5 deildir í Føroyum
- ✓ 1 deild í Grønlandi
- ✓ 200 fulltíðarstarvsfólk

**Dótturfeløg í Føroyum:**

- ✓ Trygd, skaðatryggingar
- ✓ NordikLív, lívstryggingar
- ✓ Skyn, ognarmeklari

BANKNORDIK

**GRØNLAND**
BANKI
(mDKK)

| | |
|---|---|
| Útlán: | 1.243 |
| Innlán: | 544 |
| Realkreditt: | 860 |
| Operating cost/income, % | 39 |
| Fulltíðarstarvsfólk, við ársenda | 17 |

**FØROYAR**
BANKI, TRYGGING OG MEKLARI
(mDKK)

| | |
|---|---|
| Útlán: | 6.833 |
| Innlán: | 7.791 |
| Realkreditt: | 1.771 |
| Operating cost/income, % | 53 |
| Fulltíðarstarvsfólk, við ársenda | 183 |

BANKNORDIK
TRYGD
SKYN

# Burðardygd



# Okkara **áhugabólkar** og **burðardygdspolitikkur**

Burðardygd og virkisábyrgd er kjølurin í okkara ferð móti málinum at skapa langtíðar virðir saman við okkara áhugabólkum. Áhugabólkarnir eru t.d. okkara stavsfólk, kundar, nærsamfeløg og íleggjarar. Hóast vit meta hesar vera okkara kjarnuáhugabólkar, so eftirmeta vit javnan samanhangin millum og týdningin av bólkunum.

Arbeiðið við burðardygd skal hanga saman við virkseminum og málunum hjá samtakinum, har atlit verður tikið at ávirkan okkara á uttanhýsis viðurskiftir. Við støði í tí megna vit betur at skilja okkara umhvørvið og okkara leiklut í hesum umhvørvi. Hesin leiklutur loyvir okkum at raðfesta burðardygd, har vit strategisk menna fíggjarligt støðufesti og síggja vakstrarmøguleikar í teimum marknaðum, vit eru í.

**Politikkur**
Vit hava ment ein burðardygdspolitikk, ið varð viðgjørdur og góðkendar av nevndini í desember 2022. Endamálið við politikkinum er at lýsa karmarnar fyri arbeiðið og skipan av burðardygga økinum, ábyrgda- og arbeiðsbýtið og vegleiðingar til at útinna arbeiðið í gerandisdegnum. Við einum ítøkiligum politikki fer BankNordik-samtakið at arbeiða við burdygd sum ein natúrligur liður í kjarnuvirkseminum og at gera arbeiðið gjøgnumskygt. Politikkurin er miðsavnandi fyri, hvussu arbeiðið hjá burðardygdsnevndini og -bólkinum verður skipað. Politikkurin kann lesast her.

**Nevnd**
Komitéin skal á ein strategiskan hátt bæði velja og viðgera viðkomandi evnir innan burðardygd. Fyri at burðardtgd skal blíva ein natúrligur partur av dagliga virksemi, hevur tað týdning,, at limirnir hava neyðuga avgerðarrættin á teirra økjum. Tí er komitéin sett saman av burðardygds-ráðgeva og leiðslubólkinum hjá samtakinum. Harafturat hevur forstjórin í samtakinum evstu ábyrgd av komitéini.

**Bólkur**
Ein arbeiðsbólkur er settur, sum skal góðskustryggja og stuðla undir burðar-dygga økið.

Ein breidri vitan er umboðað við limum við servitan, ið er neyðug, tá evnir verða viðgjørd í bólkinum. Tað er komitéin, ið setir stevnuna og velur, hvørji evnir verða viðgjørd í bólkinum, sum so kemur við uppskoti til niðurstøður og avgerðir.









# Okkara mál

Vit hava í fleiri ár brúkt Heimsmálini hjá ST sum karmur fyri, hvussu vit kunnu stuðla undir gongdini móti eini burðardyggari framtíð. Hóast vit viðurkenna, at tey 17 Heimsmálini hanga saman, so hava vit eyðmerkt fimm teirra, ið eru serliga viðkomandi fyri okkara virksemi. Tey fimm málini eru:

- Dygdargóð útbúgving (4)
- Javnstøða millum kyn (5)
- Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur (8)
- Burðardyggir býir og bygdir (11)
- Veðurlagsátøk (13)

Tá tú lesur hesa frágreiðing, leggur tú helst merki til, at vit vísa til viðkomandi Heimsmálini omanfyri, tá tey eru galdandi.

Í 2023 fara vit framhaldandi at meta um, hvussu vit kunnu arbeiða við heimsmálunum, og eisini hvussu vit kunnu tillaga okkara átøk og raðfestingar. Úrslitini fáa vit við okkara "materiality assessement", sum er ein greining av teimum burðardygds-evnunum, ið vit fara í holt við í 2023.



8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

# Ávirkan á **búskapin**

Vit eru tilvitað um, hvussu stóra ávirkan vit hava og kunnu hava á búskapin í samfeløgunum, vit eru partur av, og tískil stremba vit altíð eftir eini jaligari ávirkan. Okkara stavsfólkahópur við áleið 200 dugnaligum og ágrýtnum starvsfólkum hevur tryggjað okkara góðu fíggjarligu avrik seinastu árini, sum tú kanst lesa í okkara Fíggjarfrágreiðing fyri 2022.

Vit hava ávirkan á búskapin í samfelagnum upp á fleiri mátar. Ítøkiliga rinda vit partafelagsskat av lønandi virkseminum. Harafturat eru vit ein stór fyritøka við nógvum starvsfólkum, og vit eru eisini við til at skapa enn fleiri arbeiðspláss í okkara virðisketu.

Okkara størsta ávirkan er tó at finna í sjálvari tænastuni til okkara kundar. Her verður serliga hugsað um stuðla kundunum at økja um teirra virksemi á ein so burðardyggan hátt sum gjørligt og at bjóða kundunum eina skilagóða ráðgeving, tá fíggjarligar avgerðir skulu takast.

Fyri at uppfylla núverandi og framtíðar krøv og eftirspurningi so binda vit okkum til at gera viðkomandi meningarátøk og -skipanir í 2023. Við hesum tryggja vit okkum, at vit varðveita og økja okkara støðu, ið skal stuðla undir positiva ávirkan á okkara nærsamfelag og kjarnuáhugabólkar.

Hvussu vit gera hetta, og hvørji átøk eru framd, kanst tú lesa meira um á næstu síðunum.

**BEINLEIÐIS BÚSKAPARÁVIRKAN Í 2022, DKKm**

| | 2022 | 2021 |
|---|---|---|
| Rakstrarinntøkur | 446.8 DKKm | 407.1 DKKm |
| Lønarútreiðslur | -152.3 DKKm | 145.2 DKKm |
| Veitaraútleiðslur | -84.9 DKKm | -84.5 DKKm |
| Partafelagsskattur | -43.0 DKKm | 97.2 DKKm |
| Vinningsbýti | -250.0 DKKm | -836.0 DKKm |
| Samfelagsgagnligar íløgur | -2.5 DKKm | -2.8 DKKm |
| Eginogn broytt | -85.3 DKKm | -728.6 DKKm |

# ESG



# ESG og Nasdaq

BankNordik varð góðkent sum "Nasdaq ESG Transparency Partner" í 2022. Hetta merkir, at okkara ESG-lyklatøl eru góðkend og at finna á ESG dátupalli hjá Nasdaq. Nasdaq-góðkenningin er viðurkenning av virkjum, ið vísa fram ESG-relatera dáta gjønumskygt og objektivt fyri núverandi og komandi íleggjarum.

Viðkomandi ESG- lyklatøl vóru útflýggjaði til netborna skrásetingarpallin hjá Nasdaq, og teirra eftirmeting hevur ført til góðkenningina av okkara lyklatølum.

Í stuttum vísir teirra góðkenning, at vit raðfesta burðardygd, at vit betra um gjøgnumskygni á marknaðinum og at vit áhaldandi betra um góðskuna av ESG-støðinum.

NASDAQ ESG TRANSPARENCY PARTNER •
Nasdaq
2022

# ESG-LYKLATØL
# **Umhvørvi**

| **Lyklatøl[1]** | **Eind** | **Mál (2025)** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Co2e, scope 1 | Tons | 0 | 93.7 | 118.7 | 143.4 | 143.1 |
| Co2e, scope 2 | Tons | 75 | 246.0 | 290.4 | 287.5 | 287.1 |
| Orkunýtsla | GJ | 4,200 | 4,949 | 5,067 | 5,328 | 5,204 |
| Varandi orka | % | 50 | 37.9 | 30.5 | 31.6 | 34.5 |



[1] Umhvørvislyklatølini í hesari frágreiðing og fyri 2021 fevna um føroyska og grønlendska virksemið hjá samtakinum. ESG-frágreiðingin fyri 2020 fevndi bert um virksemið í Føroyum.

# ESG LYKLATØL
# **Fólk**

| **Lyklatøl**[2] | **Eind** | **Mál (2025)** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsstyrki | Starvsfólk sett fulla tíð | | 200.3 | 202.2 | 377.7 | 392.7 |
| Kynsbýti | % | 40-60 | 63 | 64 | 60 | 59 |
| Kynsbýti á leiðslustigi | % | 40-60 | 49 | 50 | 41 | 42 |
| Lønarmunur millum kyn | Ferðir | | 1.2 | 1.2 | 1.3 | |
| Starvsfólkaskifti (tá fólk fara úr starvi)[3] | % | 7 | 7.59 | 16.3 | 10.7 | 12.2 |
| Sjúkrafrávera | Dagar/starvsfólk | 5 | 10.9 | 8.6 | 7.8 | 8.7 |

| **Lyklatøl** | **Eind** | **Mál (2025)** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Net Promoter Score (hugurin hjá kundum at viðmæla samtakið) | Stig | >90 | 46 | 60.6 | 69 | |



[2] Lyklatølini fyri fólk í 2019 og 2020 fevna um virksemið hjá samtakinum í Føroyum, Danmark og Grønlandi, meðan lyklatølini fyri 2021 og 2022 fevna um virksemið í Føroyum og Grønlandi.

[3] Frásølan av danska virkseminum ávirkaði starvsfólkaskiftið í 2021.

# ESG-LYKLATØL
# **Leiðsla**

| **Lyklatøl**[4] | **Eind** | **Mál (2025)** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kynsbýti í nevnd | % | 40-60 | 40 | 20.0 | 16.67 | 33.3 |
| Uppmøting til nevndarfundir | % | - | 95.6 | 100 | 98.9 | 95.7 |
| Lønarmunur millum forstjóra og starvsfólk | Ferðir | - | 6.5 | 6.7 | 6.4 | 5.7 |



[4] Lyklatølini fyri leiðslu í 2019 og 2020 fevna um virksemið hjá samtakinum í Føroyum, Danmark og Grønlandi, meðan lyklatølini fyri 2021 og 2022 fevna um virksemið í Føroyum og Grønlandi.

# Burðardygt nærsamfelag











Okkara núverandi burðardygdsátak, "Ger mun", sum vit marknaðarføra, hevur til endamál at økja tilvitskuna um tørvin á varandi orkuloysnum, og sostatt kunnu vit hjálpa okkara kundum við skiftinum móti eini burðardyggari framtíð. Vit hava bundið okkum til framhaldandi at menna og betra okkara tænastur nú og tey komandi árini.

Fyri at tryggja, at okkara stravsfólk eru við í hesi tilgongdini, so hava vit skipað fyri einum innleiðsluskeiði um burðardygd í fíggjargeiranum. Tað er álagt øllum núverandi og komandi starvsfólkum at taka skeiðið.

Harafturat hava nøkur stavsfólk fingið víðkaða venjing og skeiðir um burðardygd og íløgur. Tey hava luttikið í verkstovu við okkara samstarvsfelaga, BankInvest, sum er ein danskur íløgugrunnur.
Hetta gevur starvsfólkunum førleikar at skipa prátið við kundan, har burðardygd gerst ein natúrligur partur av kundaprátinum, og sostatt kann kundin gerast meira tilvitað/ur um burðardygd.

Í byrjanini av 2023 fara allir vinnukundaráðgevar á eitt líknandi skeið fyri at stuðla undir teirra ráðgevingina í sambandi við burðardygd og ESG. Endamálið við skeiðinum er at geva okkara starvsfólk ta neyðugu vitanina, soleiðis at kundarnir kunnu byggja víðari á ta vitanina í sínum dagliga virksemi.

Við at lyfta okkara serfrøði og royndir og samstundis eisini virka sum kveikjarar fyri skiftinum til varandi orku, kunnu vit geva okkara íkast, soleiðis at okkara nærsamfelag kann mennast og vaksa á ein burðardyggan hátt.

13 CLIMATE ACTION

# Minka okkara **umhvørvisfótaspor**





Vit hava bundið okkum til at røkka okkara ESG-málum.

Seinastu tvey árini hava vit eftirmett og sett enn meira framsøkin ESG-mál. Málini fevna m.a. um, at vit hava bundið okkum til at fáa okkara beinleiðis útlát (vav 1) niður á NULL í 2025 og at minka um okkara óbeinleiðis útlát (vav 2) somuleiðis niður á NULL í 2030. Fyri at málið fyri vav 2 skal røkkast, má SEV eisini røkka sínum málið fyri 2030, tí vav 2 fevnir m.a. um el-orku til okkara virksemi.

Beinleiðis útát (vav 1) er knýtt at útláti frá kolvetni, sum kemur frá okkara besin- og dieselbilum og oljufýring til at hita nakrar av okkara bygningum. Vit eru væl ávegis við at skifta okkara bilar um við elbilar, og ein ætlan er løgd fyri at skifta oljufýringar út við varandi orkukeldu.

Hendan framgongdin er liður í at minka okkara spor á umhvørvið og kunnu røkka okkara málum í 2025.



5 GENDER EQUALITY

# Leiðsla næstan í **kynsjavnvági**

Søguliga sæð hevur stórur munur verið á kynsjavnvágini í okkara vinnu. Vit eru sannførd um at fjølbroytni - og sostatt kynsjavnvág – elvir til betri virksemi og úrslit á øllum mótum. Tískil er tað heilt natúrligt, at øll – sama hvat kyn viðkomandi er – fáa bjóða javnbjóðis møguleikar og kunnu førka seg í teirra yrkisleið og harvið átaka sær ein leiðsluleiklut í samtakinum.

Tað at vit seinastu árini eru vorðin meira tilvitað um kynsbýtið hevur havt ta ítøkiligu ávirkanina, at býtið millum kynini á leiðslustigið gerast meira javnt.

**Framhaldandi átak**

Okkara mál er at tryggja, at bæði kynini eru umboðað í bæði leiðslustørvum og á okkara deildum. Ítøkiliga málið er, at kynsbýtið í mesta lagi skal vera 40-60%.

Kvinnur við leiðsluábyrgd í samtakinum vaks frá 41% í 2020 til 50% við ársenda í 2021, og í 2022 var talið 49%. Hóast vit kunnu vísa á eina jaliga gongd síðani 2018, tá 31% av leiðarunum vóru kvinnur, so krevur javnt kynsbýtið, at vit eru tilvitað og arbeiða áhaldandi við at skapa karmarnar fyri jøvnum kynsbýti.

Ein avbjóðing er, at kvinnur umboða 63% av samlaða starvsfólkahópinum og hava størv í samtakinum, ið krevja stytri útbúgvingar og harvið liggja í einum lægri lønarlagi. Hetta er eisini ein avbjóðing í øðrum geirum í samfelagnum, men vit royna at gera mun við m.a. at eggja monnum at taka barsilsfarloyvi, geva starvsfólkum við smábørnum størri smidleika viðvíkjandi arbeiðstíðum, og eisini at bæði kyn eru umboðað í endaliga bólkinum til starvssetanir.

**Javnvági og framtíðar krøv**

Í løtuni lúka vit tilráðingarnar fyri kynsjavnvág, ið Finans Danmark hevur sett fram. Í stuttum mælir Finans Danmark til, at fyritøkur áseta mál fyri kynsjavnvág fyri leiðarar og nevndarlimir. Hóast tilráðingarnar ikki verður galdandi fyrr enn við ársenda í 2023, so eru vit kortini longu farin í holt við hetta. Í okkara ESG-lyklatølum, havi vit ásett málið 40/60 prosent umboðan fyri hvørt kynið.

Hóast vit eru væl ávegis í sambandi við kynsjavnvág, so fara vit áhaldandi at arbeiða við at varðveita og betra um kynsjavnvág á deildum og í leiðslu.





Pia Holm Jensen, privatkundastjóri, Grønland



Torvald J. Petersen, leiðari fyri kundatænastuna, ið er í Føroyum

# Okkara áhugabólkar



# Okkara **íleggjarar**

Íleggjarar krevja gjønumskygni í teirra íløgum og serstakliga, tá talan er um burðardygd og virkisábyrgd.

Tað hevur tískil alstóran týdning, at vit fylgja við menningini av altjóða krøvum, har vit allatíðina hugsa um krøvini hjá íleggjarum sum ein sameindur partur av okkara virksemi.

Vit eru greið yvir, at vit skapa størst virði fyri okkara íleggjarar, um vit átaka okkum ein virknan leiklut í alheimssamfelagnum. Hetta gera vit við at stuðla Heimsmálunum fyri burðardyggari menning hjá ST.

Í okkara arbeiði at menna okkara tænastur innan burðardygd, royna vit at gera ein jaligan og ítøkiligan mun í sambandi við grøna orkuskiftið og heimsmálini sum heild. Tað er tó eingin loyna, at hesin denturin eisini gagnar okkara virksemi sum fíggjarstovnur.

Í 2023 fara vit framhaldandi at leggja dent á og orku í hetta arbeiðið. Ítøkiliga fara vit at gjøgnumføra skeiðir í samtakinum, ið snúgva seg um burðardygd og virkisábyrgd. Harafturat fara vit at tosa við uttanhýsis áhugabólkar í sambandi við burðardygd og viðkomandi evnir, ið ávirka samtakið.

Eins og í hesi frágreiðing so kunna vit um okkara arbeiði við burðardygd á øðrum pallum, soleiðis at vit tryggja gjøgnumskygnið og at okkara kundar og íleggjarar eru væl kunnað um okkara virksemi. Millum annað gera vit:

- reglulig kunning
- árligar og hálvárligar frágreiðingar
- ymiskt tilfar til okkara Investor Relations-heimasíðu við øllum fíggjarhagtølum, ið eru viðkomandi fyri íleggarar
- okkara shareholder-pallur
- reglulig íleggaratiltøk



8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

13 CLIMATE ACTION

# Okkara **kundar**

Vit stremba altíð eftir at hava kundan í miðdeplinum og at skapa varandi kundasambond, ið byggja á ábyrgd og álit til gangs fyri báðar partar. Vit stíla ímóti at varðveita kundar og vilja sjálvsagt eisini vaksa um okkara kundaskara við okkara royndum og dugnasemi, sum okkara starvsfólk vísa í gerandisdegnum.

**Ávirkan frá kundum**

Íkast frá kundum hevur stóran týdning fyri, at vit kunnu betra um tænastuna og sambandið millum okkum og kundan. Vit meta allatíðina um tørvin hjá kundanum og tillaga virksemið fyri at stuðla undir kundanøgdsemið. Hetta gera vit m.a. við samrøðum og nøðgsemiskanningum. Í 2022 kannaðu vit alt okkara virksemi, har vit fingu afturboðan (feedback) frá kundum. Úrslitini eru at síggja í ESG-lyklatølunum, ið eru at finna á síðu xx.

Úrslitini vístu, at okkara kundar sum heild eru væl nøgdir við okkara ráðgeving, og úrslitini vóru harumframt betri enn árið fyri. Vit megnaðu eisini at betra okkara samskifti um okkara tænastur, sum var eitt av málunum fyri 2022. Framgongdin í samskiftinum hevur verið stuðlað av áliti frá kundanum og betran av innanhýsis mannagongdum.

Úrslitini vísa eisini øki, sum vit kunnu betra um, t.d. framhaldandi menning av talgilding av okkara tænastum, ið vit fara at arbeiða víðari við í 2023. Vit eru takksom fyri, at kundar geva sær stundir at geva okkum afturboðan, sum vit taka til eftirtektar og stremba eftir at bjóða okkara kundum enn betri tænastu og ráðgeving.

Á næstu síðu greiða vit nærri frá okkara burðardyggu loysnum til okkara kundar.






**Tørvurin hjá kundunum í miðdeplinum**
Vit bjóða okkara privatkundum trý lán, ið eru avgerandi fyri burðardygd og grøna orkuskiftið. Í 2022 sóu vit ein stóran vøkstur í eftirspurninginum eftir júst hesum lánum (sí tølini niðanfyri).

Vit hava sæð í okkara kundasamskifti og kanningum, at tað er ein vaksandi áhugi í burðardygd. Her hava starvsfólkini í BankNordik-samtakinum veruliga tikið stig til at seta seg inn í, hvat burðardygd er, og hvussu vit kunnu menna okkara tænastur á hesum mótinum.

Í 2023 fara vit at leggja enn størri dent á okkara ráðgeving, soleiðis at vit kunnu hjálpa kundunum at finna viðkomandi upplýsingar um burðardyggar umvælingar av húsum og um elbilar.

**Tað grøna skiftið**
Okkara mál er at hjálpa okkara kundum við fíggingini av teirra burðardygga skifti, og tað gera vit m.a. við at bjóða ráðgeving, ið skal eggja kundanum at taka røttu avgerðina.

Vit bjóða munagóðar fíggjarligar loysnir, sum t.d. lán til elbilar og orkulán til hús, ið ger tað lættari hjá kundum at velja burðardyggar loysnir so sum nýggj vindeygu, bjálving ella at leggja um til varandi orkuskipanir.

Burðardygdsdagsskráin er í kjarnuni av okkara virksemisstrategi og stuðlar okkara kundum at gera mun.

## Vøkstur í grønum lánum

| 2021 - 2022 | |
|---|---|
| Elbillán | +115% |
| Grønt bústaðarlán | +98% |
| Grønt orkulán | +44% |

**Tiltøk um burðardygd og fígging**
Í 2022 skipaðu vit t.d. fyri fimm tiltøkum kring landið um burðardygga umvæling, sum fingið sera góð og jalig skotsmál og vóru væl vitjaði.

Í samband við væl eydnaðu byrjanina av poddunum um privatfígging í 2021, so hava vit í 2022 gjørt enn fleiri poddar um sama evnið og enn tá eisini ein um burðardyggar møguleikar, soleiðis at okkara kundar kunnu fáa kunning um evnið á ein lættan og viðkomandi hátt.
Í 2021 vóru nøkur av evnunum íløgur, kvinnur og pengar, pensjón og hjúnarskilnaður - og í 2022 løgdu vit nøkur evni afturat listanum:

- Hækkandi rentur
- Burðardygd í gerandisdegnum
- Deildin á Tvøroyri 100 ár
- Hæddarpunktini fyri 2022 og útlitini fyri 2023



Í 2023 er ætlanin at framleiða enn fleiri poddar, ið eru viðkomandi fyri fíggjarviðurskiftini hjá okkara lurtarum. Hesi verða løgd afturat listanum av áhugaverdum pørtum, sum eru at finna á netinum.

Tú kanst lurta eftir okkara poddum her.






# Okkara **starvsfólk**

Tað hevur sera stóran týdning at varðveita og at fáa nýggj dugnalig og framsøkin starvsfólk, sum hava førleika og dugnasemi at reka ein fíggjarstovn, ið kann vera virisøkjandi. Okkara starvsfólk eru okkara týdningarmiklasta og mest grundliggjandi tilfeingi. Tískil stremba vit eftir at skapa eitt arbeiðspláss, har førleikamenning og arbeiðsnøgdsemi er í hásæti.
Vit eru tilvitað um, hvussu týdningarmikið tað er fyri okkara starvsfólk at hava eina sunna javnvág millum arbeiðslív og privatlív. Tískil leggja vit ítøkiliga tilrættis menningarætlanir fyri stavsfólk, skipa fyri sosialum tiltøkum og onnur starvsfólkaátøk, sum kunnu stuðla undir góða trivnaðinum millum okkara starvsfólk.




**Sunt arbeiðsumhvørvi**
Fyri at røkka góðum trivnaði, so raðfesta vit at skapa karmar fyri einum sunnum og dynamiskum arbeiðsumhvørvi, har øll starvsfólk kunnu mennast fakliga og persónliga.

Harafturat hevur tað stóran týdning, at okkara starvsfólk bæði sleppa og vilja mennast fakliga, eitt nú við skeiðum, innanhýsis venjingum, útbúgvingum o.s.fr.

Í 2022 brúktu starvsfólkini í BankNordik-samtakinum áleið 5.000 tímar til ymiskt menningarvirksemi í arbeiðstíðini, sum vit vita ger mun - bæði persónliga og fakliga.

Til dømis, so hava øll starvsfólk luttikið á hesum skeiðum:
1) Burðardygd í fíggjargeiranum
2) Talgilda skiftið
3) KT trygd/GDPR







**Við ársenda 2022, høvdu vit**

- 14 starvsfólk innskrivaði á akademiskar virkisútbúgvingar
- 7 banka- og trygginganæmingar innskrivaði í tvey ára langar útbúgvingar

Í 2023 fara vit at halda á fram við hesum átøkum, sum skal til fyri at eitt sunt, burðardygt arbeiðsumhvørvi, ið er strategiskt knýtt at okkara kjarnuvirksemi sum ein fíggjarstovnur.

**Starvsfólkanøgdsemiskanning**
Við jøvnum millumbilum gera vit starvsfólkanøgdsemiskanningar fyri at skilja støðuna og hýrin á arbeiðsplássinum. Endamálið við kanningini er sjálvsagt at vita, hvussu okkara starvsfólk trívast, og á hvørkjum mótum vit sum arbeiðspláss kunnu gera tað betri.

Harafturat skulu kanningarnar hjálpa okkum við at meta beinleiðis um hugin og ídnið hjá okkara starvsfólkum.

Í 2022 gjørdu vit eina sokallaða "engagement survey", sum skal stuðla okkara málum fyri framman. Sum heild vístu úrslitini, at vit eru á rættari kós, og vit síggja, at átøkini, ið higartil eru gjørd, stuðla undir vaksandi trivnaði.

Í 2023 fara vit at halda á við hesum átøkum fyri at varðveita góðu støðuna.

**JobMatch**
Í desember 2022 luttóku vit á árliga tiltakinum JobMatch, sum var hildið í Norðurlandahúsinum. Tiltakið gevur okkum møguleikan at vísa okkum sum arbeiðspláss. Okkara starvsfólk, ið luttóku, fingu fleiri áhugaverd prát við vitjandi gestir, sum í høvuðsheitum vóru við at gera útbúgving teirra lidna ella júst vóru liðug.




**STARVSFÓLKANØGDSEMI OG LOYALITETUR**
November 2022, skipað av Ennova

| Nøgdsemi/ídni | BankNordik | | Industri benchmark (GELx DK – FI) |
|---|---|---|---|
| | 2021 | 2022 | |
| Arbeiðsnøgdsemi | 77 | 80 | 77 |
| Loyalitetur | 87 | 88 | 84 |

**Starvsfólkavikuskifti í Føroyum**
Seinastu árini hava vit havt eitt starvsfólkavikuskifti annaðhvørt ár, har øll starvsfólkini í samtakinum hittast. Á vári í 2022 var starvsfólkavikuskiftið hildið í Føroyum, og tað var sum heild sera væl eydnað. Endamálið er sjálvsagt at samansjóða starvsfólkini – sum arbeiða á ymiskum deildum og eisini bæði í Føroyum og í Grønlandi. Eitt slíkt tiltak kann hava stóran týdning fyri trivnaðin hjá einstaka starvsfólkinum og eisini fyri trivnaðin sum heild millum okkara starvsfólk.

Á myndunum til høgru síggjast nakrar av teimum mongu góðu løtunum starvsfólkavikuskiftið 2022.


















4 QUALITY EDUCATION

8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

# Næmingar í BankNordik

Í august 2022 heiðraðu vit enn einaferð okkara dugnaligu næmingar, sum vóru liðug við teirra tvey ára yrkisleið hjá okkum. Útbúgvingin gevur teimum bæði praktiskar royndir og ástøðiliga vitan.

*"Í 2022 gjørdust tríggir lærningar lidnir afturat. Hesuferð vóru tað Birni Sigvardsen, Ásbjørg Hjelm og Benjamin Tvørfoss, og vit eru sera takksom fyri teirra tíð í BankNordik sum lopfjøl til teirra yrkisleið,"* sigur Heidi Davidsen, HR-leiðari.



**Heidi Davidsen**, HR-leiðari

**Vælkomin ynskja vit okkara nýggju næmingum**
Bára, Hørður, Karin, Regin og Noomi.
Í september 2022 byrjaði okkara nýggja toymi av næmingum. Vit eru sera spent at fylgja teirra menning og læra av teimum.





Birni Sigvardsen



Ásbjørg Hjelm



Benjamin Tvørfoss



**Fríðunn V. Jacobsen og Jonnna L. Olsen** lidnar sum privatkundaráðgevar í august 2022. Báðar halda fram í samtakinum.

# Hátíðarhalda okkara **virðismiklu og royndu** starvsfólk

Roynd stravsfólk hava bæði vitan og førleikar, sum ger tey ómetaliga virðismikil fyri virksemið hjá BankNordik-samtakinum. Hyggja vit eftir starvsfólkahópinum, so hava vit nógv starvsfólk, sum hava verið her í mong ár. Í 2022 hátíðarhildu vit fleiri starvsfólk, sum hava verið her í 25 ár, 40 ár og eisini longur enn tað. At hava starvsfólk við høgum starvsaldri í starvi er sera týdningarmikið fyri okkara arbeiðspláss.

**25 ár í samtakinum**
Í september 2021 hevði **Randi M Hansen**, frá okkara deildartænastu, 25-ára starvsdag.







**25 ár í samtakinum**
Í oktober heiðraðu vit **Esther M. Hansen** sum hevur arbeitt í starvsfólkakantinuni í 25 ár, har hon hevur tryggja eina týðandi part av degnum hjá flest øllum av okkum.




**Steðgar eftir 47 ár í samtakinum**
**Peter Stampe**, kundaráðgevi, fór úr starvi eftir 47 ár í samtakinum. Á myndini síggja vit Peter saman við Turið F. Arge, stjóra í BankNordik.




**40 ár í samtakinum**
1. apríl 2022 heiðraðu vit, **Edmund Jacobsen**, vinnukundaráðgeva, hansara 40-ára starvsdag. Dagurin varð hátíðarhildin saman við starvsfeløgum og familju. Á myndini síggja vit Edmund saman við Jón Brekku, vinnukundastjóra.




**40 ára dagur**
Í 2021 hátíðarholdu vit **Óluvu Jacobsen** á hennara 40-ára starvsdegi í samtakinum.

4 QUALITY EDUCATION

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

# **Stuðul** til nærsamfelagið í 2022

Í meira eina øld hava vit varðveitt eitt stekt samband við okkara nærsamfelag, har vit hava stuðlað undir sosialum, mentanarligum og búskaparligum vøkstri og menning. At stuðla lokalum átøkum hevur sera stóran týdning fyri okkara virkisskrá, tí vit meta, at tað skapar virði fyri allar partar, tá samstørvini eru væl skipaði. Vit leggja dent á at stuðla t.d. lokalum ítrotti, mentanarligum felagsskapum, fígging til vælgerandi endamál og tiltøkum, ið geva meining fyri virksemi hjá okkum.

Í 2022 veittu vit 2,5 milliónir krónur í stuðli til lokal átøk, og til hørgu sært tú býtið.




- Ítrottur, 63%
- Vælgerandi endamál, 23%
- Mentan, tónleik og list, 14%



4 QUALITY EDUCATION

8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

13 CLIMATE ACTION

# Okkara **nærsamfelag**

Okkara virksemi í dag er í Føroyum og í Grønlandi. Hóast samfeløgini og mentanirnar eru ymisk í Føroyum og í Grønlandi, so raðfesta við burðardygd og samfelagsábyrgd eins.

Eitt nærsamfelag í menning er avgerandi fyri okkara møguleikar at virka og mennast sum fíggjarstovnur – og øvugt.

Vit vilja tískil binda okkum til framhaldandi at arbeiða fyri og saman við okkara nærsamfeløgum, ið vit eru partur av. Hetta gera vit m.a. við at vera til staðar og veita okkara íkast til menning. Tú kanst lesa hæddarpunkt frá okkara leikluti í nærsamfelagnum í 2022 á komandi síðunum.



# Stuðla lokalum felagi í Grønlandi

Sunnir íbúgvar er avgerandi fyri eitt sunt samfelag, og tí hevur tað stóran týdning, at øll børn og ung hava møguleika fyri at íðka ítrótt. BankNordik hevur millum annað undirskrivað eina trý ára stuðulsavtalu við B-67, sum er eitt lokalt fótbóltsfelag í Nuuk.

Felagið hevur megnað at uppælt dugnaligar ungar spælarar og ger eisini eitt sera týdningarmikið arbeiði fyri trivnaðin hjá børnum og ungum. Hetta er nakað, sum vit ynskja at stuðla, tí tað gevur meining fyri okkum nú og frameftir. Vit eru sera spent at fylgja framtíðar menningini hjá B-67.

Sambært formanninum í felagnum, Jimmy Holm Jensen, so hevur tað stóran týdning at hava ein so stinnan samstarvsfelaga sum BankNordik á teirra liði, soleiðis at børn og ung áhaldandi kunnu hava góðar møguleikar at mennast bæði kropsliga og sosialt í B-67.



# Tvøroyri – deildin 100 ár

Í 2022 hátíðarhildu vit 100-ára føðingardagin hjá deildini í Tvøroyri. Skipað varð fyri undirhaldi og ymiskum tiltøkum í hesum sambandi, og starvsfókini á deildini høvdu lagt nógva orku í fyri at tryggja, at alt var klárt til at taka í móti teimum mongu gestunum, ið komu á gátt henda dagin.

Í sambandi við føðingardagin gjørdu vit millum annað ein podd viðeinum lokalum søgufrøðingi, sum greiddi frá samfelagnum á Tvøroyri fyri 100 árum síðani, og eisini hvussu samfelagið og bankin hevur ment seg seinastu 100 árini. Myndir, ið vístu søguligu gongdina hjá Tvøroyri hesi árini, vórðu settar upp saman við sokallum "roll-ups" við QR-kotu til poddin.










# BankNordik **høvuðsstuðul** hjá Eydnudeildini

BankNordik og Eydnudeildin eru farin inn í eina samstarvsavtalu at halda á fram at við teirra arbeiði at skapa meiningsfullar og jaligar upplivingar fyri børn við serligum tørvi og familju teirra.

Eydnudeildin, sum er limur í danska felagsskapinum, Lykkeliga, hevur virkað í Føroyum í fýra ár. Í 2022 skipaðu tey fyri EydnuCup, sum er ein hondbóltsfestivalur. Tiltakið var sera væl eydnað og lokkaði ikki færri enn 400 luttakarar úr Føroyum og Danmark.

Morten Hust Petersen, samskipari hjá Eydnudeildini, sigur, at stuðulin frá BankNordik er eitt sera týðandi íkast til teirra endamál at skapa smíl, látur og góðar upplivingar fyri børn ígjøgnum hondbólt og felagsskap - og samstundis at geva foreldrum rásarúm til ein steðg.

Vit í BankNordik eru sera errin av at hava møguleikan at stuðla hesum virðismikla arbeiði, sum Eydnudeildiin ger, tí vit síggja, hvussu nógv arbeiði hjá Eydnudeildini hevur at siga fyri børnini. Og vit vóna, at samstarvið millum okkum og Eydnudeildina kann vera við til, at Eydnudeildin kann røkka enn fleiri málum.

Fyri at hátíðarhalda formligu undirskrivingina av avtaluni, var BankNordik vertur fyri eitt stjørnutiltak fyri limir í Eydnudeildini, sum komu til høvuðssæti okkara í limousine  og vórðu móttikin við einum reyðum teppi, ið varð rullað út til okkara heiðursgestirnar. Eftir at formligu viðurskiftini vóru komin uppá pláss, helt hátíðarhaldið fram við onkrum leskiligum at drekka og køkum. Til høgru eru myndir fra tiltakinum.





**Samstarv við HSF**
Okkara samstarv við Hondbóltssamband Føroya helt fram í 2022, har vit skipaðu fyri ymiskum kappingum fyri børnum, ið m.a. kundu vinna ein venjingartíma við landsliðsvenjarinum hjá monnunum. Okkara samstarvs vil halda á fram og menningin av føroyskum hondbólts-spælarum er eyðsæð. Vit eru stolt av at vera partur av hesi framgondgini.







4 QUALITY EDUCATION

# Leiðin til vitan

Í fleiri ár hava vit latið eina bók til øll børn, ið byrja í 1. flokki - og 2022 var einki undantak. Endamálið við gávuni er, at vit ynskja at stuðla undir og vera við til at byrta lesihugin og lesigleðina hjá børnum og ungum.

Tað er ein sannroynd, at tess fleiri bøkur eru í heiminum hjá barninum, tess størri kann áhugin eftir at lesa gerast. Við hesi gávuni vilja vit tí geva øllum børnum – sama hvaðani tey koma frá - møguleika at lesa, mennast og forvitnast.

Hendan leiðin til vitan ger jaligan mun, meta vit og á næstu síðu kanst tú lesa um onnur líknandi átøk, ið vit hava skipað í 2022.



4 QUALITY EDUCATION

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

# Menna pengavanarnar hjá ungdómi

BankNordik hevur servitan og kjarnuvirksemi, ið er at veita ráð til fíggjarviðurskifti, og okkara tilgongd byggir á eina felagsfatan, at góðir pengavanar eru sera týdningarmiklir. Vit hava lagt dent á at geva børnum og ungdómum frálæru at skilja hendan týdningin.

Í 2021 byrjaði okkara átak "Pengadagur", har skúlanæmingar í 9. flokki fáa undirvísing um pengar og vanlig fíggjarviðurskifti. Hetta varð endurtikið í 2022. Endamálið er at geva ungum innlit í fíggjarlig viðurskifti, sum ofta kunnu tykjast rættiliga fløkt og fjar.

Tað eru ráðgevar í BankNordik, sum standa fyri undirvísingini, og skúlarnir melda flokkarnar til.

Til Pengadagin fáa næmingarnir millum annað undirvísing í:

- Inntøkum og útreiðslum Løn,
- Skatti og rættindi hjá ungum á arbeiðsmarknaðinum
- Lán og rentu
- At leggja eina fíggjarætlan
- Talgildum pengum og tryggari atferð á netinum

“Fíggjarligir trupulleikar í ungdóminum kunnu hava stórar avleiðingar fyri framtíðina hjá tí einstaka. Tí eiga øll ung í Føroyum at fáa grundleggjandi vitan um pengar og fíggjarviðurskifti, soleiðis at tey við sunnum og góðum pengavanum kunnu fáa so góða byrjan upp á vaksna lívið sum gjørligt”, sigur Turið F. Arge, varastjóri í BankNordik

"Tað er gott, at onkur tekur stig til at undirvísa næmingum í fíggjarviður-skiftum. Hetta eru viðurskifti, sum hava stóran týdning. Forbrúk hjá børnum er stórt í dag, og tí er skilagott, at tey fáa forstáilsi fyri pengum," sigur Høgni Joensen, skúlastjóri í Skúlanum við Løgmannabreyt.

**Eisini í Grønlandi**
Í 2022 skipaðu vit eisini fyri Pengadegi í Grønalandi, og hevur átakið eisini fingið sera góða móttøku og skotsmál frá næmingum og lærarum. Átakið er í løtuni á rundferð uttanfyri Nuuk, og vit eru spent at vita, hvussu hetta eydnast.



# Vit vilja fyribyrgja fíggjarbrotsverki

Í BankNordik eru vit miðvís í at styrkja okkara skipanir og førleikar at tryggja okkara virksemi, kundum og samfelagi ímóti fíggjarbrotsverki. Vit stremba ímóti at minka váðan fyri, at okkara virksemi verður nýtt til ólógligt virksemi sum t.d. hvítvask og fígging til yvirgangsvirksemi.

**Áhaldandi eftiransni**
Vit hava áhaldandi raðfest lýdni, compliance, við viðkomandi lóggávu og mannagongdum, sum stuðla undir at minka váðan fyri fíggjarbrotsverki, har endamálið er at tryggja, at okkara skipanir og stravsfólk fylgja leiðbeiningum, ið eru knýttar at lóggávum og mannagongdum.

Av tí at vit eru undir eftirliti av danska Fíggjareftirlitinum, so eru okkara innanhýsis skipanir, politikkir, mannagongdir og virkisgongdir eftirmettar og kannaðar við jøvnum millumbilum.

Í 2022 vóru vit nágreinliga kannaði av eftirlitinum á hvítvaskøkinum og fingu viðmerkingar og tilmæli, sum vit hava sett sum mál at arbeiða við og at gera neyðugu tillagingar.

**Veruleikakent skeið**
Vit dagførdu okkara tilfar til skeið frá Finanssektorens Uddannelsescenter (FU) og okkara egna innanhýsis tilfar viðvíkjandi mannagongdum. Hetta hevur gjørt okkum før fyri at fara frá "test-based" til "case-based" skeið, ið ger læringina so veruleikakenda og viðkomandi sum gjørligt fyri eitt og hvørt starvsfólk í BankNordik.

**Anti-money laundering (AML)**
Harafturat hava vit í samstarvi við danskar mynduleikar luttikið á National Risk Assessment 2022, sum nú hevur fingið tveir serstakar kapittlar um váðameting av hvítvaski í Føroyum og Grønlandi. "Hetta er sjálvsagt nakað, vit fegnast um, og vit fara sjálvandi framhaldandi at geva okkara íkast til menningina av hesi lokalu vitanini, ið hevur alstóran týdning fyri virksemið hjá BankNordik," sigur Jenny Person, sum hevur hevur ábyrgdina á AML hjá samtakinum.

**Ítøkilig amboð**
Við okkara áhaldandi arbeiði at berja niður fíggjarbrotsverk, so tryggja vit okkara kundar, samfelag og okkara virksemi við eini røð av amboðum:

- Lýdni við viðkomandi lóggávum og regluleringum
- Árlig meting av váða fyri hvítvaski og fígging til yvirgangi
- Ein anti-money laundering-politikk (AML)
- Fyribyrgjandi mannagongdir
- Starvsfólkaútbúgving
- Effektivar skipanir
- Eygleiðing av flytingum
- Innanhýsis eftirlit
- Mentan við etiskari atferð millum starvsfólk
- Tætt samstarv við mynduleikar og fíggjargeiran sum heild



**Jenny Person** hevur ábyrgdina av politikkum, kontrollum, virkisgongdum og frágreiðing um Anti-Money Laundering (AML) hjá BankNordik samtakinum. Harumframt hevur Jenny ábyrgdina av eftirmeting av váðaeksponering og lýdni við lógarkrøv á økinum.

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

# Føroysk nútíðarlist

**BankNordik-savnið**
Í 2017 setti BankNordik á stovn BankNordik-savnið og gav samstundis savninum 623 listaverk í gávu. Høvuðsendamálið við savninum er at varðveita og geva øllum áhugaðum atgongd til at síggja tey mongu áhugaverdu listaverkini, sum bankin hevur keypt gjøgnum árini. Harumframt er eitt av endamálunum at menna listasavnið og føroyska list.

**Serstøk játtan til føroyska nútíðarlist**
Í 2020 gjørdi BankNordik av at lata BankNordik-savninum 150.000 kr. um árið til at keypa føroyska nútíðarlist fyri. Serstaka peningaliga játtanin hevur til endamáls at endurnýggja og framtíðartryggja savnið, so tað í størri mun endurspeglar nútíðina í listarligum høpi.

Serstaka árliga játtanin var í fyrsta umfari latin frá 2020 til 2024, og tað er stýrið fyri BankNordik-savnið, ið skal umsita stuðulsjáttanina og keypa listaverk til savnið.

Í avtaluni er ásett, at árliga stuðulsupphæddin skal brúkast til at keypa nýggja føroyska upprunalist, ið er framleidd av virknum listafólkum.

**Framsýningar**
BankNordik-savnið skipar m.a. fyri sersýningum og lænir listaverk út til søvn umframt almennar og privatar stovnar. Á henda hátt kunnu verkini fáa nýtt lív og skapa gleði fyri øll, sum hava áhuga fyri list.

**Listaverk í 2022**
Sambært BankNordik-savninum vórðu 13 verk løgd afturat savninum, ið hevur keypt 26 verk síðan 2017. Verkini í 2022 vóru frá hesum listafólkunum:

- ✓ Torbjørn Olsen, trý verk
- ✓ Arnold Vegghamar, níggju verk
- ✓ Astri Luihn, fýra verk

Tú kanst lesa um BankNordik-savnið her.



## UM FRÁGREIÐINGINA

Frágreiðingin er ein sjálstøðug árlig Burðardygdsfrágreiðing (Corporate Sustainability Report, CSR) hjá BankNordik-samtakinum og inniheldur kunning um framgongd (Communication on Progress, COP). Frágreiðingin vísir tilsøgnina hjá BankNordik til meginreglur hjá UN Global Compact og krøvunum í føroysku roknskaparlógini at yvirhalda menniskjarættindi, arbeiðararættindini, umhvørvið og anti-mutur

Frágreiðingin er galdandi fyri virksemið hjá BankNordik-samtakinum í fíggjarárinum 2022 og inniheldur dáta frá bankavirksemi, tryggingarvirksemi, meklaravirksemi og pensjón, ið fella undir hesi nøvn: BankNordik, Trygd, Skyn og NordikLív. Frágreiðingin nágreinar framgongdina móti burðardygdsmálum hjá samtakinum og veitir upplýsingar um ta ávirkan, sum virksemi hjá BankNordik hevur á fólk og umhvørvið.

Frágreiðingin inniheldur eisini ESG-lyklatøl, menning, mál og viðkomandi átøk.

Frágreiðingin er ment í tráð við burðardygdspolitikkin hjá BankNordik-samtakinum.

Frágreiðingar og dáta frá undanfarnum árum er at finna á heimasíðuni hjá BankNordikher.

Frágreiðingin heldur føroyska og danska lóggávu.

**P/F BankNordik**
Oknarvegur 5
P.O Box 3048

